

# Skrivstovufólk

Tórshavnar kommuna søkir eftir dugnaligum og ágrýtnum starvsfólki til stjórnarskrivstovuna.

### Starvið

Stjórnarskrivstovan, ið húsast í Ráðhúsinum á Vaglinum, er eitt toymi við 4 skrivstovufólkum, ið taka sær av uppgávum sum borgarstjóri og aðrir stjórar varða av, t.d. fundarskráum, fundarfrásagnum, tænastuferðum til starvsfólk, móttøkum og øðrum ad. hoc. uppgávum.

Sum partur av toyminum er neyðugt, at tú ert ábyrgdarfull/ur, smidligur og dugir væl at samstarva.

Høvuðsábyrgdarøkið hjá tær verður at avgreiða viðskiftafólk, ið venda sær til stjórnarskrivstovuna, persónliga ella gjøgnum telefon, fundarfrásagnir, tænastuferðir til starvsfólkini, samstarv við vinarbýir o.a.

Av tí at stjórnarskrivstovan hevur samskifti við útlandið, er neyðugt, at tú dugir væl at samskifta á norðurlendskum og enskum.

### Førleikakrøv

Neyðugt er at hava skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving.

### Setanarviðurskifti

Starvið verður lønt sambært sáttmálanum millum Starvsmanna-felagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya í 3. lønarflokki, treytað av at tú hevur nøktandi útbúgving og royndir.

### Meiri fæst at vita

um starvið við at venda sær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, telefon 30 20 10.

### Umsókn

saman við avritum av viðmælum, útbúgvingarprógvi og upplýsingar um royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. februar 2007.

Merkið brævbjálvan »Skrivstovufólk til Stjórnarskrivstovuna«.

**Tórshavnar kommuna**



# STARVSFÓLK TIL KRÁSADEILDINA Í MIKLAGARÐI

Søkt verður fólki M/K til at arbeiða 40 tímar um vikuna í krásadeildini í Miklagarði, at byrja beinanvegin. Løn eftir avtalu. Ert tú framúr kundavinarlig/ur, opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Tú gerst partur av einum vælleikandi liði, við nógvum starvsfólkum, í einum nógv vitjaðum umhvørvi.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

### SEND UMSÓKNINA TIL:

Slaktarin, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn
ella send ein teldupost til jorgen@jyde.dk
Tú kanst eisini ringja 31 52 62 og spyrja eftir Eydnu.

**MIKLAGARÐUR**

Dogg